# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Spennandi verkætlan

Herfyri skrivaði stjórin í nýggja samanlagda stovninum SamVit opið bræv til bæði løgting og landsstýri, har hon kom við eini inniligari og skilagóðari áheitan um at raðfesta alternativar vinnu í størri mun. Har hon staðfesti, at fiskivinnan er høvuðsvinna okkara, men at vit eru noydd til at hugsa um annað enn fisk skulu vit yvirliva á hesum klettum í framtíðini. Eingin ivi er um, at vit framhaldandi skulu menna fiskivinnuna, men nú altjóðagerðin er vorðin ein veruleiki, og vit eisini vita, hvussu svikalig fiskivinnan kann vera og hvussu vandamikið tað er bara at hava eitt bein at standa á búskaparliga, mugu vit til at hugsa og hyggja øðrvísi. Hetta hava mong roynt hesi seinastu árini, men tað er líkasum, at tey alternativu beinini ikki festa røtur ella eru so smá, at tey muna ov lítið.

Tað má tí sigast at vera sera hugaligt, tá vit nú um dagarnar frættu, at ein av landsins størstu fyritøkum, og ein fyritøka, sum ikki er innan fiskivinnuna, fer at gera sáttmála við eitt av heimsins størstu oljufeløgum, BP. Hesin sáttmáli snýr seg um at binda tvey framleiðandi oljufelt vestan fyri Hetland í Shefarkaðalin hjá Føroya Tele. Hetta fer at geva BP nógvar sparingar og nýggjar møguleikar. Føroyar Tele kann við hesum fáa víðkað sítt kundaøki út um Føroyar og inn í eina altjóða vinnu, sum rúmar nógvar møguleikar fyri framtíðar samstarvi.

Tað er einki minni enn ein sensatión, at ein føroysk fyritøka á henda hátt fær ein sáttmála, sum í veruleikanum kann gerast ein duraopnari til so nógvar aðrar tele- og aðrar tænastur í oljuvinnuni. Fyribils er talan um ein fimm ára sáttmála, sum kann tátta í 100 mill. kr. Og vit vita, at er tú komin inn í hesa vinnu og oljufeløg hava fingið álit til eina fyritøku, so kunnu her vera óavmarkaðir møguleikar at víðka um tænastuveitingarnar.

Júst henda vinnarasøgan kann vera fyrimynd fyri aðrar føroyskar fyritøkur. Hon kemur eisini sum kallað, tá vit hugsa um brævið frá stjóranum í SamVit til myndugleikarnar. Hon vísir, at vit megna at lyfta og ganga undan, eisini tá tað um annað enn fiskivinnu ræður.

**Sosialurin**



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, er firtin um afturvendandi oljudálkingina á Havnarvág. Hann saknar uppfylging frá løgregluni í slíkum málum - og krevur nú, at hetta málið verður fylgt upp, líka mikið hvør hevur ábyrgdina*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Stór oljudálking í Havn

**Sløkkiliðið í Havn stríddist í morgun við at avmarka dálkingina av einum oljuleka, ið hevði breitt seg um alla vágna í Havn**

UMHVØRVI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

- Í løtuni royna vit at leggja byrgingar út, og fáa avmarkað dálkingina, men tað er sera torført, tí oljan er longu farin um alla vágna. Vit hava olju á sjónum báðumegin Tinganes, segði Hans David Hansen innsatsleiðari á staðnum fyri Tórshavnar sløkkilið við Sosialin.

Sløkkiliðið fekk fráboðanina í morgum beint eftir klokkan átta, og tá var olja longu farin víða um. Sløkkiliðið er enn ikki farið undir at fáa oljuna upp ella at staðfesta júst hvussu nógv olja talan er um. Tey hava heldur ikki ábendingar um, hvaðani oljulekin stavar. Tá blaðið fór til prentingar, hevði sløkkiliðið roynt at avbyrgja oljuna í útvið fýra tímar, men tey høvdu ikki fingið tamarhald á støðuni.

### Hetta gongur ikki longur

Borgarstjórin í Havn Heðin Mortensen er staddur í Nuuk í løtuni, men yvir telefonina varð hann kunnaður um lekan í morgun, og frá honum eru boðini greið:

- Hetta gongur ikki longur, vit kunnu ikki liva við, at oljulekar eru á Havnarvág í tíð og ótíð. Eg havi biðið tekniska stjóran um at fylgja málinum og at melda málið til løgregluna, tá vit hava staðfest ábyrgdina, sigur Heðin Mortensen úr Nuuk.

Borgarstjórin sigur, at hann saknar uppfylging av dálkingarmálum frá løgregluni. Kommunan hevur sambært honum ferð eftir ferð heitt á løgregluna í dálkingarmálum, men hetta er sambært Heðini Mortesen, sum at sláa í ein kodda.

- Eg havi givið greiðan ordra um, at hetta skal meldast og fylgjast upp, óansæð hvør hevur ábyrgdina av dálkingini, tað verið seg vinnulívið her, um oljan kemur uttanífrá, ella um vit sjálvi eiga ábyrgdina, sigur Heðin Mortensen.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13:30

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.